Nomatek:

# Nýggj útgerð til Landingarmistøðina og nýtt arbeiðsdekk til Beinir

**– Vit hava aftur tikið lærlingar inn, og sum heild er ein størri optimisma. Vit eru so nær knýttir at fiskivinnuni, og hóast vit hava eina javna framleiðslu av vatnreinsiverkum og ein vissan útflutning av UV útgerð, so ger hetta ov lítlan mun, tá sveiggini í fiskivinnuni gerast so stór, sum tey hava verið í alingini, sigur Jákup Magnussen, stjóri á Nomatek, sum aftur hevur nógv arbeiði**



*M/Tr Beinir, tann nýggjasti trolarin hjá Axel Hansen, har Nomatek skal montera eitt nýtt arbeiðsdekk*

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tá alivinnan næstan hvarv, minkaði virksemið á Nomatek niður í helvt. Men nú tykist gongd at vera komin í aftur virkið, sum júst hevur ment nýggja útgerð saman við Føroya Fiskavirking.

– Tey seinastu tvey árini hava verið stravin. Hóast vit alla tíðina hava havt eina javna framleiðslu til flakavinnuna, serliga til Fiskavirking, har vit saman við teimum hava ment ymiska nýggja útgerð, vóru vit tíverri noyddir at siga fólk upp, og vit tóku ongar nýggjar lærlingar inn. Men fyri at varðveita ein part av teimum góðu handverkarunum, sendu vit sjey sveinar niður á sveisiskeið í 7-8 vikur í fjør vár. So nú hava vit certifikatsveisarar til rustfrítt og svart stál.

Hetta sigur Jákup Magnussen, stjóri á Nomatek í Havn.

Hann sigur víðari, at í ár hevur virksemið verið í øking.

– Vit hava aftur tikið lærlingar inn, og sum heild er ein størri optimisma. Vit eru so nær knýttir at fiskivinnuni – og hóast vit hava eina javna framleiðslu av vatnreinsiverkum og ein ávísan útflutning av UV útgerð, so ger hetta ov lítlan mun, tá sveiggini í fiskivinnuni gerast so stór, sum tey hava verið í alingini, sigur hann.

Landingarmiðstøðin í Klaksvík og á Toftum hevur leingi arbeitt við eini ætlan at byggja út, og í summar skrivaðu Nomatek og Landingarmiðstøðin undir ein sáttmála um veiting av nýggjari útgerð. Útgerðin umfatar broytingar og automatisering av kassatøming, kartøming, nýggja avísingarskipan, ísdosering, kassavask v. m. Útgerðin verður latin í stigum tvørtum alt heystið.

– Við hesari útgerð skuldi arbeiðið kunnað fallið nógv lættari, samstundis sum tað gevur nýggjar møguleikar í arbeiðinum á Landingarmistøðini, sigur Jákup Magnussen.

M/tr Beinir, tann nýggjasti trolarin hjá Axel Hansen (P/f Kimbil) , kom til landið í august mánaði. Hann er gott 43 m langur og 10,4 m breiður. Á Nomatek hava teir gjørt tað mesta av útgerðini á trolarunum hjá Axel Hansen, og aftur hesa ferð vunnu teir tilboðið. Uppskotið umfatar paunar, flutningsbond, vaskimaskinu og íseting av kryvjimaskinu.

Sum Sosialurin skilir, so er talan um ein stóran ordra til virkið í Havn upp á umleið fýra milliónir krónur.

Á Nomatek eru nú 30 fólk, harav tríggir tekna og projektera, og í løtuni er fløskuhálsurin tekningar.

– Nú er um at fáa tekningarnar út á verkstaðið so skjótt sum møguligt, og tað er ein meira hugalig støða, sigur Jákup Magnussen, stjóri í Nomatek.


Móttøka



60 ár

Í sambandi við at liðin eru 60 ár, síðan elfelagið SEV var stovnað, verður almenn móttøka á skrivstovu felagsins á Landavegi 92, Tórshavn,
fríggjadagin, 29. september 2006 frá kl. 15-17

REPROZ

SEV




www.sansir.fo

MÓTTØKA

Í sambandi við at Edvard Heen er settur sum varastjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum, verður móttøka í hølum okkara á Kongabrúnni,

fríggjadagin

29. september 2006 frá kl.15.00 til 17.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari